Sigrid Dalsgaard, sum er manager hjá Týr, fer at greiða frá, hvussu hon hevur marknaðarført Týr, og hvussu konsertferðirnar eru komnar í lag. Síðani Sigrid byrjaði sum manager hjá Týr í juli 2002, hevur bólkurin nátt væl út um landoddarnar við konsertferðum, ummælum og sølu

What does it take?

Mánadagin 4. oktober verður spennandi tónleikatiltak í Norðurlandahúsinum undir heitinum »What does it take?«

TÓNLEIKATILTAK

Vit eiga nógvar evnaríkar tónleikarar! Tilfeingið innan tónleik er stórt og fjølbroytt! Hetta hoyra vit ofta, tá ið prátað verður um tónleik. Men er tað nóg mikið? Hvat meira skal til fyri at gera tónleikin til ein vinnuveg? Hesir spurningar og fleiri aðrir verða viðgjørdir mánadagin 4. oktober, tá ið eitt spennandi tónleikatiltak við heitinum "What does it take" verður í Norðurlandahúsinum. At heitið er á enskum, er ikki av tilvild, tí dagurin fer í høvuðsheitum at snúgva seg um, hvat krevst av avvarðandi myndugleikunum, vinnuni og eisini tónleikarunum sjálvum fyri at menna tónleikaumstøðurnar í Føroyum og møguleikarnar at koma viðari út í heim við føroyskum tónleiki.

Til hetta endamálið koma fyrilestrahaldarar úr Svøríki, sum meira enn nakað annað norðurland hevur megnað at skapa góðar karmar fyri tónleikamenningini og eisini gera tónleik til eina stóra útflutningsvøru. Danmark hevur júst gjørt stórar íløgur innan tónleik og m.a. hetta verður at hoyra meira um frá danska luttakaranum. Stjórin fyri íslendska plátufelagið 12Tónar, sum gav út Krákuna við Eivør Pállsdóttir, kemur eisini at halda fyrilestur. Hartil verða fyrilestrar úr Føroyum, sum í høvuðsheitum snúgva seg um, hvussu ein kann bera seg at við at marknaðarføra sín tónleik í útheiminum. Eftir framløgurnar er eisini tíð sett av til spurningar og tjak soleiðis at høvi er hjá luttakarunum at fáa okkurt meira ítøkiligt at vita frá fyrilestrahaldarunum. Uni Arge verður orðstýrari og kemur at stýra gongdini. Fyrilestrarnir verða í Høllini meðan Dansistovan verður karmur um eina kunningartænastu, har til ber at fáa meira at vita um útbúgvingarmøguleikar innan tónleik frá Altjóða Skrivstovuni. Eisini fer annað áhugavert tilfar at liggja frammi og atgongd verður eisini til alnótina. Seminarið byrjar kl. 10.00 tá ið Vinnumálaráðharrin Bjarni Djurholm bjóðar vælkomin.

Eitt sindur um fyrilestrahaldararnar

Christer Lundblad hevur verið stjóri á Export Music Sweden í 4 ár. Export Music Sweden er ein sølufyritøka við tí endamáli at hjálpa og betra um marknaðarføringina av svenskum tónleiki á altjóða marknaðinum. Christer Lundblad hevur drúgvar royndir innan tónleik, ikki bert innan umsiting men eisini sum tónleikari. Hann hevur eisini havt egnan plátuhandil í Stockholm, og í nógv ár starvaðist hann sum tónleikajournalistur á stórsta svenska dagblaðnum, Dagens Nyheter. Harafturat hevur Christer arbeitt fyri fleiri týðandi plátufeløg, m.a. CBS Records, Sonet Grammofon, Warner Music, og hevur verið altjóða stjóri fyri Naxos Jazz og White Cloud.

Gunnar K. Madsen er stjóri á ROSA, Dansk Rock Samråd og hevur eisini fleiri aðrar týðandi postar innan tónleik, m.a. hevur hann leiðsluna av SPOT Festivalen, er nevndarlimur í Music Export Denmark, og formaður fyri spælistaðið VOXHALL í Árhus, fyri LMS, sum stendur fyri Levende Musik i Skolen. Hann hevur í nógv ár verið limur í Statens Musikråd og hevur annars royndir sum 'bookari'. Gunnar K. Madsen hevur havt tætt samstarv við Kashmir, Mew, Tina Dickow, Teitur, TV-2, Tim Christensen og nógv onnur. Á hvørjum ári luttekur hann á fleiri tónleikaráðstevnum og messum, m.a. Midem í Frankaríki, Popkomm í Týsklandi, og In the City í Onglandi.

Elin Hentze er lesandi við lærda háskúlan í Keypmannahavn og skrivar í løtuni høvuðsritgerð um PR av tónleiki í samband við útbúgving sína til Cand. Mag. í Miðilsvísindi. Frammanundan er hon útbúgvin marknaðarfrøðingur við Niels Brock í Keypmannahavn og B.A. í films- og miðilsvísindi við hjágrein í mentanarjournalistikki við lærda háskúlan í Keypmannahavn. Elin Hentze hevur eisini royndir innan tónleikaverðina við tað at hon hevur arbeitt við formidling og PR í Føroyum og Danmark, seinast í samband við tónleikatiltakið Atlantic Music Event í VEGA.

Lárus Jóhannesson er stjóri og eigur plátufelagið 12Tónar, sum uttan iva eina mest er kent her vegna útgávuna av fløguni Krákan við Eivør Pálsdóttir. Lárus stovnaði plátufelagið fyri 7 árum síðani, og hevur heilt frá byrjan havt ein týdningarmiklan leiklut í íslendska tónleikapallinum og gjørdist skjótt eitt vældámt møtistað fyri tónleikara so sum Bjørk, Sigur Rós, múm, gus gus, og fleiri. Krákan var fyrsta fløgan, sum plátufelagið gav út, og nú er rættilig gongd komin á útgávuvirksemið hjá felagnum. 12Tónar skulu eisini geva út komandi solo fløguna hjá Eivør.

Sigrid Dalsgaard er manager hjá Týr, og fer hon at greiða frá, hvussu hon hevur marknaðarført Týr, og hvussu konsertferðirnar eru komnar í lag. Síðani Sigrid byrjaði sum manager hjá Týr í juli 2002, hevur bólkurin nátt væl út um landoddarnar við konsertferðum, ummælum og sølu. Týr hevur verið á konsertferðum í Íslandi, Norra, Danmark, Letlandi, Pólandi, Russlandi, og Týsklandi. Í heyst fara teir at spæla í Finlandi og aftur í Russlandi. Fløgurnar "Eric the Red" og "How far to Asgaard" hava fingið minst 60 ummælir og eru eisini spældar á útvarpsstøðum kring heimin. Við ummælum og konsertferðum hevur verið møguligt at skapa sølu uttan fyri Føroyar, og við tíðini skal hetta gerast vinnuvegurin hjá Týr-manningini. Framløgan á tónleikaseminarinum er ein liður í at vísa øðrum tónleikarum hvussu teir kunnu koma út um Føroyar.

Ben Malén er føddur í Finlandi, men hevur seinastu árini búð í Svøríki. Hansara tónleikaroyndir byrjaðu í Finlandi, har hann spældi trummur í nógvum bólkum og skrivaði sangir og fekk fyrsta plátusáttmálan 19 ára gamal í 1979. Hann hevur útgivið ørgrynnu av fløgum saman við ymiskum bólkum, tey síðstu árini sum sangari. Í 1984 flutti hann til Svøríki og stovnaði bólkin Trance Dance, sum fekk sáttmála við Sony og var ein tann best dámdi poppbólkurin í Svøríki síðst í 80'unum við eini sølu uppá yvir 500.000 plátur og á alheimsins hittlistum. Fyrst í 90'unum avgjørdi Ben Malén at gevast sum tónleikari, og eftir hetta hevur hann starvast innan ymisk útgávufeløg í løttum samstarvi við Per Gessle frá Roxette. Eitt av høvuðsendamálunum hevur verið at finna nýggj talentir og megnaði hann at fáa sáttmála í lag fyri 24 ung talentir meðan hann starvaðist í felagnum Jimmy Fun Music. Í 1998 stovnaði hann Tom Bone Music, eitt framleiðslu- og útgávufelag, sum fekk ein tíðandi leiklut í útflutninginum av svenskum tónleiki og hevði sáttmála við fleiri av kendastu sangskrivarunum. Síðsta ári í hesum felagnum var ikki veggjapláss nokk til allar tær gull- og platinplátur, sum felagið fekk úr øllum heiminum. Tað seinast árið hevur Ben Malén verið stjóri á kenda útgávufelagnum Air Chrysalis Scandinavia, sum m.a. umboðar kendu svensku sangskrivarnar Anders Bagge, Paul Rein, Millencolin, og hartil eisini altjóða nøvn so sum Blondie, Billy Idol, David Bowie, Tom Waits.

ítróttur

Nr. 183 • leygardagur • 25. september 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

Toppskjúttin heldur fram á Eiði

Ein góður hópur, gott leikaraumhvørvi og vón um framhaldandi framgongd eru høvuðsorsøkirnar, sigur Sonni L. Petersen

Enn er avtalan ikki undirskrivað, men tað skuldi verið heilt víst.

Sonni L. Petersen, sum í ár hevur fingið sítt veruliga gjøgnumbrot, hevur tikið avgerð um, at hann eisini í komandi ári fer at at spæla í EB/Streymi.

- Tað er rætt. Eg havi trivist sera væl hetta kappingarárið. Bæði á og uttanfyri vøllin, og tí hevur avgerðin ikki verið serliga trupul, heldur Sonni.

Saman við góða árinum hjá Sonna sjálvum, hevur EB/Streymur eisini havt eitt fint kappingarár, sum væl kann enda við bestu endastøðu felagsins nakrantíð. Og einki er at ivast í, at bæði leiðslan í felagnum og leikararnir sjálvir halda, at hetta er nakað, sum byggjast skal víðari uppá.

- Nú er sjálvandi ikki alt endaliga greitt, men tað er nógv, sum bendir á, at talan verður um á leið sama leikarahóp til komandi kappingarár, og tað hevur eisini vigað nógv hjá mær. Sjálvur haldi eg í øllum førum, at tilfarið at byggja víðari við er sera gott, og vit í hópinum trúgva í øllum førum upá, at tað kann gerast enn betri, heldur Sonni L. Petersen at enda.

So er tað greitt, at toppskjúttin hjá EB/Streymi eisini verður í felagnum komandi kappingarár

HB-GÍ:

Heini spælir ikki aftur í ár

Nú gullið er komið til høldar, hevur HB-venjarin valt at lata aðrar leikarar fáa møguleikan fram um seg

UPPTAKT
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Fyri seinastu ferð í ár skal HB spæla fyri heimaáskoðarum, og stendur tað upp til leikararnar, so skal hetta gerast við manér.

- Gullið er sjálvandi komið til høldar, men fyri tað ætla vit ikki at gevast við at spæla. Tað vildi eisini tikið nakað av glansinum av tí heila, um vit nú fara niður í gear til seinastu dystirnar, so tað hava vit ongar ætlarnir um, sigur Jákup á Borg.

HB-venjarin hevur tikið avgerð um, at hann ikki longur verður at síggja á vøllinum hetta kappingarárið

Jákup var sjálvur í álopinum, tá HB var í Klaksvík seinast, og tað er ikki óhugsandi, at hetta eisini verður leiklutur hansara hesaferð.

Í øllum førum hevur Heine Fernandez boðað frá, at hann ikki fer á vøllin meira í ár, men at hann heldur vil geva øðrum leikarum møguleika at vísa sítt virði.

HB hevur annars at kalla alt fólkið tókt. Undantakið er Vagnur Mohr Mortensen, sum fekk reytt kort í dystinum í Klaksvík. Har er Hallur Danielsen helst upplagdur avloysari, og hóast hann hevur havt onkrar smávegis trupulleikar í vikuni, so varð roknað fyri vist, at hann fer at verða tøkur til dystin.

Nógv frávera

Hjá GÍ stendur hinvegin einki til. Eitt er, at talan á pappírinum er um helst truplasta dystin á árinum, men hartil er liðið eisini ógvuliga skert til dystin.

Krzystof Popczynski, Poul Henning Jacobsen og Atli Gregersen eru allir leikbannaðir, og tað hevur við sær, at farast má á triðjudeildarliðið eftir fólki. Avgjørt ikki ein støða, sum tey í Gøtu eru so fegin um, tí næstbesta liðið hevur sunnudagin sera avgerandi dyst móti HB. Tvey stig eru millum tey bæði liðini í oddinum í triðju deild, so alt bendir á, at vinnarin av teirri uppgerðini vinnur sær rætt til beinleiðis uppflyting.

Ójavnt í Vági

Talan hevur ongantíð verið um javnleik í Vági, tá KÍ hevur vitjað seinastu tíggju árini, og so er spurningurin, um VB skal javna støðuna, sum í løtuni sigur 5-4 til KÍ, tá tosast skal um sigrar um hesi árini.

Ananasr siga hagtølini, at GÍ fær eina sera trupla uppgávu í Gundadali, eins og B68 kann hava eina sera væl grundaða vón um bjarging, tá EB/Streymur vitjar. B68 hevur nevnliga vunnið allar fýra uppgerðirnar, sum liðini higartil hava leikt á Svangaskarði. Samtundis sær tað trupult út hjá ÍF, sum ikki hevur vunnið heimadyst móti B36 hesi árini, tá at fuglfirðingar tríggjar ferðir hava fingið javnleikin, sum væl kann gerast nóg mikið hesaferð. Og endaliga hevur tað enn ikki eydnast Skála at vinna heimadyst móti NSÍ, sum vitjar sunnudagin.

Talvan sýnir, hvussu tað hevur tornað út, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst í tilsvarandi dystunum seinastu tíggju árini.

-jm

	03	02	01	00	99	98	97	96	95	94	Í alt	
Skála-NSÍ	1-3	0-4	-	-	-	-	-	-	-	-	0-0-2	1-7
HB-GÍ	2-2	3-0	2-3	5-0	2-0	3-0	2-0	3-2	0-0	1-0	7-2-1	23-7
VB-KÍ	1-0	2-1	1-2	1-0	2-1	0-4	1-0	0-2	1-2	-	5-0-4	9-12
ÍF-B36	-	-	-	-	1-4	0-0	1-2	1-1	-	2-2	0-3-2	5-9
B68-EB/S	4-2	2-1	1-0	-	-	-	-	-	-	4-1	4-0-0	11-4